# Nýggjur skúli byrjar á Tvøroyri mánadagin

**Tey hava ikki rópt hart upp um skúlan, men í komandi viku kann kristiligi felagsskapurin Youth With a Mission taka ímóti fyrstu næmingunum. Tey hava ognað sær eini sethús á Tvøroyri, har sjey ungfólk, harav ein úr Vietnam, nú seta hvørjum øðrum stevnu við Bíbliuni í hond**



*Tvøroyri verður karmur um nýggja altjóða og kristiliga skúlan, har næmingar úr fleiri londum fara at ganga*

UNDIRVÍSING
*Snorri Brend*

Tað er ikki hvønn dag at farið verður undir nýggjar skúlar í Føroyum. Men mánadagin í komandi viku verður ein nýggjur skúli veruleiki á Tvøroyri.

Henda dagin fara sjey næmingar at seta hvørjum øðrum stevnu í einum húsum á Hvítanesi, sum kristiligi felagsskapurin Youth With a Mission (stytt: YWAM) hevur keypt til endamálið.

Teir flestu næmingarnir eru føroyingar, men eisini útlendingar hava víst áhuga fyri hesum nýggja skúlanum. Gongst sum ætlað kemur nevniliga ein næmingur heilt úr Vietnam at ganga í skúla á Tvøroyri.

Hóast hetta er fyrsti skúlin av slíkum slagi í Føroyum, so hevur YWAM fleiri slíkar skúlar kring allan heimin. Upplýst verður, at einir 10.000 næmingar taka henda skúlan á hvørjum ári kring allan heimin.

Fleiri føroyskir ungdómar hava gjøgnum árini verið á slíkum lærusveinaskúlin í øðrum londum. Ein slíkur skúli finst í Noregi, sum fleiri føroyingar kenna. Fyri fáum árum síðani var ein miðvingur á hesum skúlanum, har hann sum ein partur av einum teami m.a. vitjaði í vesturafrikanska landinum Mali.

Óansæð um skúlin liggur á Tvøroyri, Noregi ella øðrum heimspørtum, so er endamálið tað sama, nevniliga at menna næmingarnar til eina tænastu í Guds ríki, úti og heima.

### Heima og úti

Fólk á Tvøroyri hava helst lagt merki til eitt økt virksemi í einum av sethúsunum á Hvítanesi. Her hava fólk frá felagsskapinum nevniliga arbeitt í eina tíð við at fyrireika móttøkuna av teimum sjey næmingunum.

Nú er alt tilbúgvið, og mánamorgunin byrjar so undirvísingin, sum fer at halda fram til 28. juni í ár. Og tað er ikki hissini upplivingar, sum bíða hesum sjey næmingunum.

Skúlatíðin verður nevniliga skipað í tveimum, - ein partur við undirvísing og upplæring, meðan ein í hinum partinum fer í onnur lond at virka innan missión. Tann seinasta vikan er sett til eftirmeting av skúlatíðini.

Av tí at næmingarnir ikki bert koma at verða í Føroyum, er kostnaðurin eisini hareftir – 35.000 kr. Í hesum er gjald fyri undirvísingina, undirvísingartilfar, mat, uppihald og ikki minst fyri ferðingina í onnur lond.

### Lovsangur og missión

Fyri at kunna hava ein skúla av slíkum slagi og eina undirvísing á røttum støði, er sjálvandi neyðugt við undirvísarum. Av tí at skúlin er tvímæltur, verður undirvísingin bæði á enskum og á føroyskum máli av bæði føroyskum og útlendskum undirvísarum.

Mong áhugaverd evni verða tikin fram, m.a. um Guds persónleika og eyðkenni, um profetiska bøn og um lovsang. Eitt annað av stóru evnunum er um heimsáskoðanina í Bíbliuni og um heimsmissión.

Hetta seinasta er jú ein natúrlig fylgja av at næmingarnir í helvtini av skúlatíðini skulu út í onnur lond at virka. Her verður undirvísingin skipað sum bønarhald fyri tí landinum, sum Gud leggur teimum á hjarta at fara til.

### Úr Vietnam

Hesin føroyski lærusveinaskúlin er higartil royndur tvær ferðir í Havn. Úrslitið hevur verið so mikið gott, at ein í YWAM nú leggur til brots á triðja sinni.

Endamálið við undirvísingini er at tann einstaki næmingurin skal mennast, bæði andaliga og menniskjansliga. Talan er jú um ein altjóða skúla, og tí er ynskið at útlendingar eisini verða við, soleiðis at ein frá ymiskum bakgrundum, tungumálum og mentanum koma at búgva og virka saman.

Ætlanin er, at ein næmingur skal koma ta longu leiðina úr Vietnam til skúlan á Tvøroyri. Men tá vit mánadagin høvdu samband við leiðsluna fyri skúlan, vóru ikki øll viðurskiftini við innferðarloyvinum fingin til vega.

- Vit miðað tó eftir, at alt hetta fer at laga seg, so at hesin vietnamesarin kann fara úr heimlandi sínum mikudagin, sigur Sanna Hammer, umboð fyri YWAM í Føroyum.

# Eina tímaløn til tey neyðstøddu

**Nú um dagarnar kom Ása Andreasen úr Havn við einum heldur øðrvísi hugskotið um, hvussu føroyingar eisini kunnu gera mun í hjálpararbeiðinum í fjareystri**

ÁHEITAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

»Fríggjadagin 7. januar 2005 millum 11.00-12.00 arbeiða vit øll ókeypis. Lønin fyri hendan tíman fer ístaðin til ein hjálparfelagsskap, sum tit á tínum arbeiðsplássi verða samd um at tit vilja stuðla.«

Soleiðis ljóðar áheitanin frá Ásu Andreasen, sum er ein av teimum mongu, sum ikki fær rist óhugnaligu sjónvarpsmyndirnar frá vanlukkuøkinum av sær. Og tað er hon í grundini takksom fyri, tí hon er vís í, at áhaldandi myndirnar hava fingið fólk at raknað við

– Var tað ikki fyri allar hesar ræðuligu myndirnar – serliga tær frá CNN og BBC – hevði hendan áheitan helst ikki komið frá mær beint nú. Tað ber stutt sagt ikki til at lata eyguni aftur longur, tí við sjónvarpsmyndunum er hettta annars so fjara økið knappliga komið inn í stovnunar hjá okkum øllum, sigur Ása

### Ein tími fyri lív!

Ása hevur givið sínum hugskoti heitið »Ein tími fyri lív!« Tankin er, at tú arbeiðir á tínum vanliga arbeiðsplássi ein tíma, men ístaðin fyri, at tú fært løn fyri hendan tíma, verður tímalønin send einum hjálparfelagsskapi. Tú arbeiðir ein tíma og ert soleiðis við til at bjarga lívum!

– Um nóg nógv gera hetta, um vit fáa breitt hugskotið út um landoddarnar eisini, hjálpa vit nógvum 1000 menniskjum. Og vónandi kann hugskotið verða eitt afturvendandi átak, so at hjálparandin ikki bara hvørvir við tímanum fríggjadagin. Tað vilja altíð vera menniskju, ið hava brúk fyri hjálp, og hetta kann so verða ein máti at hava tey í huga aðrar tíðir enn bara í einum so ovurhonds stórum sorgarleiki, sum hesum, sigur Ása

### Symbolskt virði

Hetta skal als ikki skiljast sum, at eg haldi mítt hugskot vera betri enn øll hini, leggur Ása dent á. Sjálv heldur hon at vit hava ráð til at geva eitt íkast til hjálpararbeiðið bæði við at fara til konsertir, stuðla innsavningini hjá Reyða Krossi umframt at lata eina tímaløn. Men »Ein tími fyri lív« hugskotið hevur eisini eitt symbolskt virði, heldur hon.

– Tankin var, at tað skuldi vera einfalt og lætt, men samstundi hava ein djúpri týdning. Tá øll soleiðis sita og arbeiða á sínum vanliga arbeiðsplássi, uttan at nakað hendir út yvir tað vanliga, trúgvi eg, tey flestu fara at lata tankarnar leita til tey, sum tímalønin fer til beint nú, sigur Ása, sum vónar at starvsfólk og arbeiðspláss fara at taka væl ímóti hugskotinum.



*Ása Andreasen*